ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

JEWELLERY
WITH MOTIFS
FROM THE NORSE RELIGION



Freya
Freya, who originally was a sun goddess, is the symbol of human love and reproduction. The warriors who died in battle were divided into two groups, where of Freya got one half and Odin the other.



The World Tree
The Norse universe was kept together by an enormous ash tree. In the top of the tree, an eagle resides, while the serpent called Nidhug, slips between the roots. When Nidhug has gnawed itself through the root, the mighty tree shall fall and ragnarok shall start.

Mr. Anker Eli Petersen has designed this fabulous series of jewellery with motifs from the Norse religion.
At 3arin in the shopping centre SMS you can buy jewellery with several motifs, including:



3arin
SMS Shopping Centre · Tel 353535 · Fax 353536
www.3-arin.com · 3-arin@3-arin.com

# Nógvar undirskriftir

**Hósdagin fekk Bjarni Djurholm handaðar listarnar við undirskriftum, sum mótmæla, at landsstýrisog løgtingsmenn hækka egnar eftirlønir**

MÓTMÆLI
*Edvard Joensen*

**Tinganes:** Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, fekk í gjár handaðar listarnar við undirskriftunum, sum mótmæla, at landsstýrismenn fáa eftirlønarhækkan afturvirkandi til 1951. Bjarni Djurholm lat beinanveg undirskriftirnar víðari til løgmann.

Pressan var møtt upp í Tinganesi, tá teir tríggir, Hans Joensen, Baldvin Baldvinsson og Eiler Viderø, komu í Tinganes við ørkunum, har 8.450 undirskriftir stóðu á, sum mótmæltu broytingunum í politikkaraeftirlønunum.

Klokkan var júst 10, tá Hans Joensen fór á dyrnar hjá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni. Men har var stongt. Hann bankaði uppá, men har kom eingin. Hann bankaði aftur. Hart. Tá varð latið upp.

Fyrst kom ein skrivstovukvinna í dyr og segði, at landsstýrismaðurin var á veg. Síðan kom Bjarni Djurholm sjálvur og beyð inn. Hann helt hurðini, til øll vóru komi innum.

Inni á skrivstovuni fekk landsstýrismaðurin handaðar tær 8.450 undirskriftirnar, sum hann beinanveg gav løgmanni, sum eisini var komin inn á gólvið. Bjarni Djurholm metti seg ikki hava nakað við málið at gea sum so, tí tað liggur undir løgmansembætinum.

– Tí var løgmaður boðsendur, segði Bjarni Djurholm.

Spurdur um, hví júst Bjarni Djurholm, sum annar einki hevur við málsøkiðið at gera, skuldi hava undirskriftirnar, svaraði Hans Joensen, at teir høvdu lagt merki til, at hann var tann landsstýrismaðurin, sum var minst innblandaður í málið.

Løgmaður helt, at hetta málið var ov illa lýst frá byrjan og gav pressuni skuldina fyri tað. Tað kann pressan so bara taka til eftirtektar.

Hinvegin lovaði løgmaður, at hann fer at arbeiða fyri, at eftirlønirnar verða á einum rímiligum støði. Tað, sum í brævinum frá teimum, sum hava staðið fyri undirskriftainnsavningini, verður nevnt ein sømilig skipan.

Spurdir um, hvat ein sømilig skipan er, dugdu innsavnararnir ikki reiðiliga at svara. Heldur ikki løgmaður hevði nakað boð uppá, hvat eitt rímiligt støði eftir hansara meting er. Men hann fer at seta ein bólk at finna fram til tað.

Innsavnararnir duldu ikki fyri, at teir hildu seg hava ávirkað málið soleiðis, at politikkararnir hava vent 180 stig. Men teimum dámdi ikki spurningin um, hví teir ikki gjørdu vart við seg, beinanveg málið var fyri í Tinginum í apríl. Heldur ikki Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, hevði hug at svara tí spurninginum.

Víst varð á yvir fyri teimum, sum staðið hava fyri undirskriftainnsavningini, at har standa bara nøkur nøvn á listunum. Eingin adressa ella annað, sum sigur, hvør persónurin aftan fyri undirskriftina er. Í prinsippinum kann einhvør, sum vil, seta eitthvørt tilvildarligt navn á listan einar 30 ella 100 ferðir, og so telur tað fyri eina undirskrift. Men juridiskt er tað einki sum helst vert.

Men slíkum viðmerkingum frá pressuni vildu teir als ikki vita av.



*Hans Joensen handar Bjarna Djurholm undirskriftirnar …*



*… sum beinanvegin vórðu latnar løgmanni …*



*… ið síðan greiddi innsavnarunum frá, hvat málið snýr seg um*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

ítróttur

Nr. 142 • fríggjadagur • 27. juli 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Grannarnir kappast um silvurið



**Um tað fer at gangast, sum tað hevur gjørt tvær tær seinastu ferðirnar, so fara tey av Argjum at taka silvurið frá teimum í Havnini**

5-MANNAFØR GENTUR
*Jóannes Hansen*

Millum genturnar er tað stór kapping um FM heiðursmerkini. Ikki tey fínastu, tí tey hava tær umborð á Fípuni Føgru langt síðani so at siga bílagt. Tað skulu heintast á ólavsøku.

Tað eru Sílið úr Havn og Blikur av Argjum, sum kappast um silvurmerkini. Sílið hevur 23 stig, og Blikur hevur 22 stig. Tað vil siga, at tann av hesum báðum bátunum, sum verður fyrri á mál ólavsøkuaftan, fer at vinna silvur.

Bæði á Argjum og í Havnar Róðrarfelag droyma tey um at vinna á Fípuni Føgru leygardagin. Bæði bátsformaðurin umborð á Bliki og tann umborð á Sílinum halda, at tað er møguleiki fyri tí, men báðar siga sum við ein munn, at tað verður torført:

– Fípan Fagra hevur róð sera væl í ár. Tær hava fingið góðan start hvørja ferð. Í fleiri kappingum otaðu vit okkum nærri og nærri teimum, men í Sørvági miseydnaðist starturin hjá okkum fullkomuliga.

Hetta sigur Joan Mikkelsen, sum er bátsformaður umborð á Bliki.

– Í venjingini uppundir ólavsøku hava vit lagt startin um. Vit vóna, at tað fer at eydnast at fáa ein góðan start leygardagin. Um starturin eydnast, so halda vit møguleika vera fyri at bjóða Fípuni Føgru av. Men vit hugsa fyrst og fremst um at halda Sílinum aftanfyri okkum, sigur bátsformaðurin umborð á Bliki.

Tær umborð á Bliki eru blaðungar skúlagentur. Tað er bara bátsformaðurin, sum hevur róð fyrr. Hinar royna seg allar fyrsta árið í kappróðri.

## Heimasjógvurin

Undan hesum kappingarárinum fingu tey í Havnar Róðrarfelag eitt nýtt 5–mannafar. Higartil hava genturnar ikki roynt at vunnið. Sammett við tær umborð á Bliki, so er talan um roynda manning. Miðalaldurin er í hvussu so er trý ár hægri, allar hava róð í fleiri ár, og hetta er sætta árið, at bátsformaðurin, Inga Torkilshøj, rør.

– Tvær tær síðstu ferðirnar hevur Blikur verið frammanfyri okkum. Fyrsti setningurin hjá okkum verður at halda hann aftanfyri okkum. Um vit høvdu megnað at tikið Fípuna og vunnið í heimasjógvi á ólavsøku, so hevði tað verið fantastiskt, heldur Inga Torkilshøj.

Tá eitt felag fær sær nýggjan bát, so eru vónirnar ivaleyst altíð góðar um, at tað skal eydnast at vinna. Tað hava teir eisini verið í Havnar Róðrarfelag. Tá vit spyrja Ingu Torkilshøj um orøkina til, at tað ikki hevur eydnast, so vísir hon á, at Fípan Fagra eisini er nýggj, og at tað hevur gingið væl hjá teimum.

Hon vil ikki siga meiri, men vit skilja á øðrum práti, at tey, sum hava roynt at lyft kappróðrarbátarnar, halda, at báturin í Klaksvík og tann á Argjum eru væl léttari, enn nýggi báturin hjá teimum í Havnini er. Serlig tá vindurin er undan hevur hetta stóran týdning.

## Støðan 5-mannafør gentur

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Fípan Fagra | 35 |
| 2. | Sílið | 23 |
| 3. | Blikur | 22 |
| 4. | Tjaldrið | 12 |
| 5. | Ørnin | 8 |
| 6. | Drekin | 2 |
| 7. | Hvassi | 2 |
| 8. | Frúgvin | 1 |
| 9. | Havfrúgvin | 1 |
| 10. | Firvaldur | 0 |
| 11. | Beinta | 0 |
| 12. | Dúgvan | 0 |
| 13. | Snípan | 0 |
| 14. | Báran | 0 |

## Neistin móti strandingum



*Neistin og StÍF fara at spæla stevnudyst á ólavsøku*

Leygarkvøldið fara bestu mansliðini hjá Neistanum og StÍF at spæla steypadyst í ítróttarhøllini á Hálsi.

Dysturin er partur av ólavsøkuni, har hondbóltur plagar at savna nógv fólk, hóast hetta verður mett sum feriutíð hjá hondbóltsspælinum.

Dysturin millum Neistan og StÍF byrjar klokkan 19.30, og vinnan liðið fær steyp til ognar.

**ek**